# Ætla at skapa trygg arbeiðspláss í Hvalba

**Hendan fyrsta tíðin, síðani Fiskasølan keypti flakavirkið í Hvalba, hevur verið tung, men ætlanin er at skapa trygg og støðug arbeiðspláss á virkinum**



FLAKAVIRKIÐ Í HVALBA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Ætlanin er, at flakavirkið í Hvalba skal vera eitt trygt og støðugt arbeiðspláss.

Tað sigur Rógvi Reinert, stjóri á virkinum.

Tað var fyrst í november at Føroya Fiskasøla yvirtók virkið í Hvalba.

Og stjórin er tann fyrsti til at ásanna, at hendan fyrsta tíðin hjá virkinum hevur verið strævin.

– Men tað høvdu vit væntað og samanumtikið hevur hendan fyrsta tíðin verið, sum vit høvdu væntað.

Hann sigur, at tað er vanligt, at tað er lítið arbeiðið á flakavirkjunum hesa tíðina rundanum ársskiftið.

Harumframt er tað heldur ikki óvanligt, at eitt nýtt virkið eisini onkrar byrjunartrupulleikar, áðrenn tað kemur í gongd av álvara.

– Virkið hevur at kalla ligið stilt í nøkur ár, so hetta er næstan sum at byrja av nýggjum.Tó skal sigast, at nógv er gjørt við virkið, so at tað er í góðum standi.

– Harafturat vita vit, at sum heild er tað trupult hjá flakakvinnuni sum heild.

– Men tað skal vera meiri arbeiðið á virkinum enn tað er nú og tað arbeiða vit miðvíst fyri, sigur Rógvi Reinert.

*–Vit høvdu væntað, at tað fór at verða strævið í fyrstuni, men ætlanin er avgjørt at gera flakavirkið í Hvalba til eitt arbeiðspláss við støðugumarbeiði, sigur stjórin, Rógvi Reinert*

Hann sigur, at tað ætlar Fiskasølan at gera við at leggja stóran dent á søluarbeiði og at gera framleiðsluarbeiðið fyri at skapa eitt meiri støðugt og trygt arbeiðspláss.

### Mest feskar vørur

Rógvi Reinert sigur, at ætlanin er at brúka virkið til at virka fisk á.

– Talan verður um eina blandaða framleiðslu, men talan verður í høvuðsheitum um feskar vørur.

– Vit ætla at brúka virkið at skera fløk á og partvís eisini at skráskera fisk. Men so kann tað eisini væl vera, at vit fara enn longur, so at vit eisini fara at skera fløk í portiónir, fer tíðin at vísa.

Hann sigur, at tá ið virkið skal arbeiða feskt, er tað altíð ein fyrimunur eisini at kunna frysta og tað ber til á virkinum í Hvalba.

Men kortini leggur hann dent á, at viðhvørt lagar marknaðurin seg eisini soleiðis, at tað loysir seg best at flyta fiskin óvirkaðan av landinum, so tað mugu vit venja okkum við til tíðir.

– Men í høvuðsheitum er ætlanin at virka fisk og at flyta fesk fløk út.

Onkur hevur stúrt fyri, at flakavirkið í Hvalba verður ikki annað enn ein umskipingarhavn, har fiskur verður fluttur og fluttur óvirkaður av landinum?

– Nei, tað ætla vit, sum sagt ikki. Endamálið hjá okkum er virka fisk á virkinum, so at tað verður eitt veruligt arbeiðspláss.

Hann vil kortini ikki siga, hvussu nógv tons, ætlanin er at taka ímóti á virkinum, men talan verður um nøkur túsund tons um árið.

Hann vil heldur ikki siga, hvussu nógv fólk, hann væntar, koma at arbeiða á virkinum.

– Men ætlanin er at hava so støðugt arbeiði sum gjørligt, sigur hann.

Kortini sigur stjórin, at tá ið eitt talan er um at flyta feskar vørur av landinum, hevur sambandið inn á meginlandið stóran týdning.

Men í løtuni er sambandið úr Føroyum ikki nóg gott.

Í løtuni er bara ein fráferð úr Føroyum og hon er hóskvøld.

– Tað hevði avgjørt verið ynskiligt, at bátur eisini sigldi úr Føroyum fyrrapartin í vikuni, eins og tað gjørdi fyrr.

Tað hevur verið nógv umrøtt, at tað er so trupult hjá fiskivinnuni í Suðuroy, tí flutningurin er so trupul, bæði ímillum Havnina og Suðuroynna og ímillum Suðuroynna og meginlandið í Evropa.

Men tað hevur so ikki fingið Fiskasøluna at bakka.

– Hetta er sjálvandi ein spurningur, vit hava umhugsað fleiri ferðir, men niðurstøðan er, at tað eigur at bera til, hóast flutningurin er ein trupulleiki.

– Vit gera hetta sjálvsagt, tí vit trúgva upp á tað.

Hann sigur, at nú flakavirkið í Hvalba rættiliga kemur ígongd aftur og alingin í Suðuroy vónandi fótar sær aftur, verður tað skjótt at úflutningurin úr Suðuroy verður eini 15.000-20.000 tons um árið og hann vónar, at tað fer at eggja onkrum flutningsfelagið til at leggja ferðaætlanina soleiðis til rættis, at hon gagnar suðuroyingum betri enn flutningurin ger í dag.

# Vænta at óttin fyri at eta laks fer at hasa av

**Hesar seinastu dagarnar eru fólk í summum londum í Evropa fullkomiliga hildin uppat at keypa laks. Men væntandi er, at hetta fer at hasa av**

LAKSUR OG EITUREVNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*–Tíðindini um, at nógv eiturevni er í ladum laksi hevur fyribils rakt harðast í Suðurevrpa og har eru nógvar bíleggingar afturkallaðar. Nú verður bíðað í spenningi eftir, hvussu teir komandu dagarnir fara at roynast*

– Í summum londum eru fólk heilt hildin uppat at keypa laks.

Tað sigur Finn Rasmussen á Landshandlinum, sum selir ógvuliga nógvan laks kring um í heiminum. Hann sigur, at úrslitið av kanningini sum amerikanskir vísindamenn kunngjørdi í farnu viku, hevur havt ógvuliga stóra ávirkan á tey á marknaðin.

– Í summum londum er talan um fullkomiligt samanbrota marknaðin um, sigur hann.

Hann sigur, at serliga í Suðurevropa, í Fraklandi og í Spania, hevur reaktiónin verið ógvuslig og í hesum báðum londum eru fólk at kalla hildin uppat at keypa laks, síðani kanningin varð almannakunngjørd.

– Kanningin hevur verið ummrødd bæði í sjónvarpi og í bløðunum í hesum londum og reaktiónin kom alt fyri eitt, sigur hann.

Hann sigur, at hetta hevur ført við sær, at fleiri bíleggingar eru afturkallaðir í Suðurevropa.

Hann sigur, at fólk eru fult greið yvir at dioxin er eitt tað vandamesta eiturevnið, sum yvirhøvur er til og tí eru tey fullkomiliga hildin uppat at keypa laks. Hinvegin tykist tað ikki sum um at danir eru ávirkaðir av kanningini, tí har hava fólk keypt laks sum vanligt.

– Onkur keypari í Danmark hevur biðið um upplýsingar um laksin, eitt nú, hvat fóður hann hevur fingið.

Kortini sigur hann, at keypararnir vænta, at hetta fer at hasa av aftur og at tað ganga nakrir dagar, so fara fólk aftur at keypa laks.

Um tað so fer at fáa nakra ávirkan í longdini, er ilt at siga, men fer sølan at minka nøkur prosent av hesum her - og fer hon at minka nøkur prosent, hvørja fer ein matvørugøla stingur seg upp - ja so er tað eitt vandamál.

Allastaðni verður nú bíðað í spenningi eftir, hvussu marknaðurin fer at vera teir komandu dagarnar.

### Rakar allan laks

Hinvegin sigur Finn Rasmussen at fyri fólk er ein laksur ein laksur og óttin fyri at eta laks, rakar sostatt allan laks.

– Allur laksur er raktur av hesum, um hann so kemur úr Føroyum ella hann kemur onkra aðrastaðni frá. Hetta rakar sostatt eisini laks úr Noregi og øðrum londum.

– Í tíðindunum, sum hava verið frammi í ymsum londum, er ikki so nógv gjørt burturúr, at føroyskur og skotskur laksur skal vera serliga illa eitraður, men fyri brúkaran er ein laksur ein laksur.

Hann at føroyingar eiga at taka hendan trupulleikan í størsta álvara.

Og hann ivast ikki í, at í longdini er keyparin sinnaður at at betala meiri fyri eina ódálkaða vøru.

– Tað er marknaðinum, sum vit liva av og vit eiga at taka øll krøv frá marknaðinum í fullum álvara. Keypararnir seta størri og størri krøv til dygd. Teir krevja at fáa meiri og meiri at vita um tann mat teir eta. Og samstundis sum fólk sum heild hugsað meiri og meiri um umhvørvið. Tí ivist eg ikki í, at í longdini hevði tað loyst seg at arbeitt fyri at havt eina so ódálkaða vøru sum gjørligt, sigur Finn Rasmussen.

Hinvegin heldur hann ikki, at tað hjálpir nógv hjá einstøkum alibrúkum at minka nøgdina av eiturevnum í laksi, tí tað kann vera sera trupult at fáa laks frá einstøkum alibrúkum marknaðarførdan sum nakað serligt. Tí heldur hann, at trupuleikin má takast upp sum heild og viðgerast undir einum.






*Torfinn Smith, formaður í teknisku nevnd, og Jan Christiansen, borgarstjóri, fegnast um nýggju endurnýtsluskipanina á Hjalla*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Formaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag:

# Signar fer at kosta

**Tjóðveldisflokkurin hevur eina stóra afturgongd í Eysturoy, og tað er óivað tann sannroynd, at Signar á Brúnni ikki er við á listanum, ið hevur kostað flokkinum atkvøður**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*

Nýggjasta veljarakanningin, sum Sosialurin og Fynd hava gjørt í samstarvi við Fynd, vísir, at Tjóðveldisflokkurin hevur eina afturgongd á 4,6 prosent í Eysturoynni.

Formaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, Hallur Ellingsgaard, metir, at fráveran hjá Signari á Brúnni óivað hevur kostað flokkinum í hesi kanningini.

– Fólk velja ógvuliga lokalt, og eg rokni við, at vit missa flest atkvøður í Fuglafirði. Tað kann tó eisini vera afturgongd sum heild, sigur Hallur Ellingsgaard, sum metir, at fleiri atkvøður kunnu fara til hinar báðar atkvøðuslúkarnar í Fuglafirði, sum eru Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkinum og Dan Reinert Petersen úr Javnaðarflokkinum.

Hann sigur, at nógv tjóðveldisfólk í Eysturoy eru kedd um, at Signar ikki kom við á listan.

– Nevdin kundi ikki havt gjørt meira fyri at fáa Signar á listan, men kanska um fuglfirðingar høvdu møtt betri upp á fundinum hevði óivað verið øðrvísi, sigur formaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag.

### Eingin broyting

Tað er annars eingin broyting í teimum valdømisvaldu tinglimunum í Eysturoynni. Sambandsflokkurin varðveitir tveir, og Fólka-, Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin fáa hvør sín.

Sambandsflokkurin hevur eina fitta framgongd, og Fólka- og Javnaðarflokkurin hava lítla framgongd.

Tað er tó áhugavert, at tann eykavaldi hjá Sjálvstýrisflokkinum sambært kanningini ikki fer at liggja í Eysturoynni. Tí kann Kári P. Højgaard kenna seg hóttan, og spennandi verður at síggja, um formaðurin hórar undan hesuferð.

Endurnýtslan á Hjalla:

# Havnin verður grønari

**Framyvir skulu havnarborgarar skilja sítt burturkast. Mánadagin varð skiljimiðstøðin á Hjalla tikin í nýtslu**

RUSKSKILJING
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Tað eru nú tvey ár síðan, at Tórshavnar Kommuna samtykti at nýta 10 milliónir krónur at byggja eina skiljimiðstøð til burturkast, sum verður nevnd "Endurnýtslan á Hjalla".

Framyvir skulu havnarborgarar skilja alt sítt burturkast, sum teir bera niðan á brennistøðina. Ætlanin er síðani at endurvinna pappír og papp, jarn og metal og olju.

Brennistøðin hevur fingið eitt samstarv í lag við brennistøðina hjá IRF í Leirvík. Ætlanin er at senda pappírið og oljuna til brennistøðina á Hagaleiti. Hinvegin verður jarn og metal pressað saman í Havn.

Brennistøðin á Hagaleiti hevur havt eina skiljistøð til pappír í eina tíð, og hetta pappírið verður sent niður til Danmarkar at endurnýtast.

– Ovnarnir á brennistøðini hava verið ovbyrjaðir, og neyðugt var at minkað um trýstið á teir. Tí hava vit valt at gera eina skiljistøð, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Á henda hátt verður alt burturkastið ikki koyrt í ovnarnar, og tí tyngir tað ikki ovnarnar eins nógv og áður, tá størsti parturin av burturkastinum varð koyrdur beint í siloina.

– Nøgdin av burturkastið hevur verið vaksandi seinastu árini, og tí máttu vit finna eina loysn, sum er varandi, sigur borgarstjórin.

Á skiljimiðstøðini verður burturkastið býtt sundur í eini fimtan ymisk sløg, og so skulu fólk sjálv koyra burturkastið í ta røttu bingjuna.

– Viðurskiftini á brennistøðini vóru í veruleikanum ikki nøktandi, tí at fólk sjálv skuldu koyra burturkastið í siloina. Hetta var ikki heilt vandaleyst, og fólk gingu eisini runt í burturkastinum, ið stóð rundanum brennistøðina, sigur Jan Christiansen.



*Tey fyrstu fólkini eru komin niðan á endurnýtsluskipanina á Hjalla. Framyvir skal alt burturkastið skiljast*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Grótbrotið fylt aftur

Grótið, sum er sprongt burtur fyri at gera pláss fyri miðstøðini, er nýtt til at fylla grótbrotið, sum er har á leið, uppaftur.

– Grótbrotið hevur staðið sum eitt sár í fleiri ár, og hetta var eitt gott høvi at fáa tað niðurlagda grótbrotið aftur. Soleiðis hava vit eisini fríðkað um landslagið, sigur Jan Christiansen.

Ætlanin er at gera hetta plássið tøkt hjá handilslívinum í Havn, so at handlar væntandi verða at síggja á hesum stað.

### Nýggjar ruskspannir og posar

Í næstum fáa allir havnarborgarar ein gráan ruskposa. Hesin skal bert nýtast til vanligt burturkast so sum matleivdir og annað. Sum liður í nýggju endurnýtsluskipanini fær hvørt húski eisini eitt grønt ílat til pappír og papp.

– Tað skal avgjørt ein hugburðsbroyting til, áðrenn hetta fer at rigga, og vónandi fara allir borgarar at taka væl ímóti hesum. Tað er nógv frammi í tíðini at fara betur við umhvørvinum, og við hesi støðini er Tórshavnar kommuna við til at betra umhvørvið, sigur borgarstjórin.

Í næstum fara borgarar í Havn at fáa kunningartilfar um hesi viðurskifti, har greitt verður nærri frá hesum viðurskiftum.

## Eingin sjúka

Í leygardags Sosialinum hava vit endurgivið formannin í Miðflokkinum fyri at siga, at kynsvillingar, t.e. samkynd, eru sjúk.

Hetta er kortini ikki rætt endurgivið. Orðini hjá Jenis av Rana vóru, at kynsvillingar eru "illa fyri". Formaður Miðfloksins sigur, at hetta er ein óheppin villa.

Talan er um eina skeiva tulking av orðunum hjá Jenis av Rana, sum vit biðja orsaka fyri.